# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

**Spyrjari:** Kim Durhuus, løgtingsmaður

**Svarari:** Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

**Evni:** Afturbering av MVG á leigubilum og afturbering av virðisgjaldi, tá bilar verða útfluttir úr Føroyum

**Spurningar:**

1. Hvussu nógvir nýggir leigubilar vórðu skrásettir í Føroyum í 2021, 2022 og 2023?
2. Hvussu nógv hevur landskassin goldið í MVG-afturbering fyri hesar bilar í 2021, 2022 og 2023?
3. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at endurskoða reglurnar um MVG-afturbering á leigubilum?
4. Hvussu nógvir bilar eru útfluttir úr Føroyum í 2021, 2022 og 2023?
5. Hvussu nógv hevur landskassin goldið aftur í virðisgjaldi fyri hesar útfluttu bilar í 2021, 2022 og 2023?
6. Hvussu nógvir av hesum bilum vóru yngri enn 1 ár í 2021, 2022 og 2023?
7. Hevur landstýriskvinnan ætlanir um at endurskoða reglurnar um afturbering av virðisgjaldi, tá bilar verða útfluttir úr Føroyum?

.

**Viðmerkingar:**

Tey seinastu árini er ferðafólkatalið í Føroyum økt munandi, og hevur tað viðført, at fleri og fleiri leigubilar eisini eru komnir út á teir føroysku vegirnar at koyra.

Hesir leigubilar fáa afturbering úr landskassanum. Hetta kann undra almikið, tí eitt av endamálunum við ferðavinnuni er jú at fáa øktar inntøkur – eisini til landskassan.

Tískil má staðfestast, at talan er um eina heldur ivasama skipan, sum letur upp fyri, at MVG-frítøkan kann nýtast til onnur endamál enn tað, hon er ætlað til.

Tí verður hesin spurningur settur.

**Á Løgtingi, 4. januar 2024**

Kim Durhuus løgtingslimur